# Míni jól

**Eyðun L. Samuelsen**



*Hvar heldur tú jól?*
Heima hjá mær sjálvum. Har verða vit fimm, sum búgva í húsunum, og sviger kemur nokk eisini. Og møguliga koma foreldrini hjá mær eisini.

*Hvussu halda tit jólini?*
Tað er upp á traditionellan máta. Eina góða dunnu til døgurða á rís á'la mandle omaná. Síðani lesa vit nakað úr jólaevangeliinum og syngja jólasangir, áðrenn farið verður til pakkarnar.

*Hvussu nógvar gávur keypir tú sjálvur?*
Sjálvur keypi eg nokk bara eina. Kanska tær verða fýra, um eg finni okkurt eyka til dreingirnar. Men skulu allar teljast við, so eri eg nokk partur av úti við 50 gávum.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Haldi ikki, at eg havi nakað serstakt ynski. Men eg sigi so ongan tíð nei takk til nøkur góð klæði.




















